Vit sóknast eftir

# Verkstaðsleiðara/blikksmiði

Til blikksmiðjuna í Havn, søkja vit ein verkstaðsleiðara ið skal standa fyri móttøku og avgreiðslu av øllum vanligum innkomandi jarn og blikksmiðjuuppgávum.

Ætlanin er, at tú verður settur sum ábyrgdarhavandi verkførari fyri blikksmiðju okkara, og kemur at avgreiða størri og smærri ordrar frá kundum, eins og tú kemur at hjálpa til við at samskipa verkstaðsarbeiði til okkara størru verkætlanir.

Tú verður sum ábyrgdarhavandi fyri verkstaðnum, ein partur av leiðslutoyminum hjá Demich, men má eisini rokna við at skula brúka ein part av tíðini til verkstaðsarbeiði sjálvur. Harumframt skalt tú kunna hjálpa øðrum sveinum og lærling-um við at loysa uppgávur innan blikksmíð.

Tað er tí umráðandi, at tú ert ein royndur blikksmiðjur og/ella at tú hevur ein góðan førleika innan hetta øki. Tað er tó ikki ein ófrávíkilig treyt, at tú er útbúgvin innan hetta øki, um tú í staðin hevur eina líknandi útbúgving ella tær røttu royndirnar.

**Vit bjóða tær**
Eitt sjálvstøðugt og avbjóðandi starv í eini fyritøki sum er í støðugari menning.

Eitt persónliga mennandi starv um tú dámar at hava ábyrgd og at fáast við ymisk menniskju. Eitt fakliga mennandi starv fyri ein góðan handverkara.

Góðar og skipaðar arbeiðsumstøðir á eina nýmótans og framkomnari blikksmiðju.

**Vit vænta at umsøkjari**
- Er handverksliga væl fyri
- Antin hevur útbúgving sum blikksmiðjur ella hevur royndur innan hetta øki
- Er førur fyri at seta seg í respekt og at halda onnur fólk í gongd
- Dugir væl at fáast við kundar og við onnur starvsfólk hjá Demich
- Hevur vanligan til góðan teldukunnleika
- Hevur vanligt koyrikort

**Lønar og setanartreytir**
Løn og treytir sambært førleikum og ábyrgd og annars eftir nærri avtalu.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 15. juni 2009. Miðað verður eftir at seta starvið skjótast gjørligt, men vit bíða eisini um neyðugt eftir rætta persóninum.

Umsóknir saman við prógvum, CV og øðrum verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

P/F Demich, postboks 378
FO-110 Tórshavn,
Att: Torbjørn Hansen.

Um tú hevur spurningar ert tú vælkomin at seta teg í samband við

Torbjørn Hansen
torbjorn@demich.fo
Tel. 309310/211071

Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311

Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565

Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501

demich@demich.fo • www.demich.fo

demich
hiti | vatn | sanitet




## Hetta fer peningurin til

**- at tryggja teimum, sum hava rústrupulleikar, bestu viðgerðina**
Ætlanin er at byggja nýtt ***viðgerðarheim***, so at umstøðurnar at hjálpa teimum, sum eru bundin av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, verða so góðar sum til ber.

**- at tryggja teimum, sum hava tørv á tí, ein virðiligan møguleika afturat**
Við ***umsorganarheiminum*** geva vit teimum, sum fyrr vóru heimleys, eitt heim. Við ***Café Blákrossstovuni*** bjóða vit eitt rúsfrítt dagtilhald, har øll eru vælkomin. Við ***búfelagsskapum*** okkara vilja vit tryggja teimum, sum ynskja eitt nýtt rúsfrítt lív, ein møguleika til tess.

**- at tryggja, at bæði vaksin og børn eru tilvitað um, hvørja ávirkan rúsdrekka og rúsevni hava**
Við ***verkætlanini ‘Børn í vanda’*** varpa vit ljós á støðuna hjá barninum, tá tey vaksnu rúsa seg. Við ***vitjan á skúlum og aðrastaðni***, har børn og ung samlast, kunna vit um hvørja ávirkan rúsdrekka og rúsevni hava. Vit vilja tryggja børnum og øðrum avvarðandi, sum eru undir ávirkan av rúsnýtslu hjá øðrum, hjálp og stuðul til ikki sjálv at byrja at misnýta rúsdrekka.